# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI PARTIN AV KARLAMAGNUSARBREYT ÍMILLUM RÓLANTSGØTU OG ÓLIVANTSGØTU

Parturin av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu var ovasti partur av serstøku byggisamtyktini, sum hevur til endamáls at skipa Karlamagnusarbreyt sum eitt miðstaðarøki fyri Hoyvík.

Politiski mynduleikin í Tórshavnar kommunu hevur tikið avgerð um minka miðstaðarøkið, og í staðin skipa hendan partin av Karlamagnusarbreyt til bústaðarøki við tilsamans 12 grundstykkir til sethús á millum uml. 375 $m^2$ og uml. 560 $m^2$.

Skipanin av økinum er sambært ásetingunum í hesum tekstskjali og kortskjølunum 1. yvirlit og 2 skipan.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til bústaðarbygging.

1.2 at tryggja, at staðsetingin og tal av grundøkjum verður sum sýnt í kortskjali 2.

1.3 at skipa tilkoyring og parkeringspláss til økið.

1.4 at áseta støðd og hædd av sethúsum

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og fevnir um matr. nr. 135nl, 135nm, 135nn, 135no, 135np, 135nq, 135nr og 135ns, Hoyvík.

2.3 Økið er uml. tilsamans 7.600 $m^2$ til støddar og liggur í A3-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu byggjast 12 sethús og felags parkeringspláss til tilsamans 12 bilar sambært kortskjali 2.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Húsini skulu byggjast innanfyri byggifeltini.

4.2 Mest loyvda hædd á húsum er 7 m frá lidnari planering.

4.3 Mest loyvda byggistig 0,3

4.4 Mest loyvda nýtslustig 0,6

## § 5. VEGIR OG PARKERINGSPLÁSS

5.1 Innkoyringar sambært kortskjali 2.

5.2 felags parkeringspláss til 12 bilar sambært kortskjali 2, umframt parkeringspláss til tveir bilar inni á hvørjum av teimum einstøku grundstykkjunum.

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

7.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

8.1 Tey viðurskifti, sum ikki eru viðgjørd í hesi byggisamtykt skulu viðgerast eftir almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

8.2 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.3 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

[redacted]

| | |
|---|---|
| Mál nr.: | HIMR JNR. 15/00732 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 7. okt 2015 |
| Váttað: | H Poulsen |


Tórshavnar Kommuna
Byggi- og býarskipanardeildin
Heiti: Sethúsarstykkir við Karlamagnussarbreyt
Viðmerking: Yvirlitskort
Skjal nummar: 1
Journal nr: 14/04565
Dagur: 22.04.2015
Mát:
Tekna: MKJ
Rættað:




**Tórshavnar Kommuna**
**Byggi- og býarskipanardeildin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heiti:** Sethúsastykkir á KMB | | | |
| **Viðmerking:** Skipan | | | |
| **Skjal nummar:** 2 | | **Journal nr:** 14/04565 | |
| **Dagur:** 22.04.2015 | **Mát:** | **Tekna:** MKJ | |
| **Rættað:** | | | |

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postboks 32
110 Tórshavn

7. oktober 2015
Mál: -/FISK j. nr. 15/00095 - HIMR 15/00732
Tygara skriv:15/00302
Viðgjørt: khp

***Góðkenningarskriv***

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Tórshavnar kommuna sent ráðnum uppskot til nýggja serstaka byggisamtykt fyri øki við Karlamagnusarbreyt millum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu til góðkenningar.

Kommunan biður í skrivi, dagfest 9. september 2015, um loyvi til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri ovara part av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu.

Ætlanin er at minka miðstaðarøkið, og ístaðin skipa henda partin av Karlamagnusarbreyt sum bústaðarøki við 12 grundstykkjum til sethús.

Serstaka byggisamtyktin fevnir um matr. nr. 135nl, 135nm, 135nn, 135no, 135np, 135nq, 135nr og 135ns, Hoyvík.

Uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri øki við Karlamagnusarbreyt hevur ligið alment frammi frá 20. juli til 17. august 2015. Tá freistin at koma við møguligum mótmæli ella broytingaruppskoti var farin, 7. september 2015, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Málið hevur verið til ummælis hjá Býarskipanarnevndini, sum hevur latið ráðnum álit í málinum, sí hjálagda avrit, dagfest 29. september 2015.

Vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri part av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu.

Hjálagt byggisamtyktartekstur og kortskjal fyri serstøku byggisamtyktini fyri part av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vinarliga heilsan

K Poulsen

Kristvør Poulsen
skrivstovufulltrúi

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • E-mail: himr@himr.fo